## DAGSINS MEINING

# Sjálvstýrisflokkurin lykil til breiða samgongu

Vit fáa helst eina smæla 17 manna samgongu við gomlu samgonguflokkunum og Miðflokkinum. Hetta er samgongan Tjóðveldisflokkurin hevur dyrgt eftir síðani valið. Tí harvið fær hann styrkt fullveldisvongin. Eftir øllum at døma er tað eisini vorðin partur av politikki og tilverugrundarlag Tjóðveldisfloksins at halda Javnaðarflokkin uttan fyri alla ávirkan. Hesi ódemokratisku og sera løgnu mannagongd tykjast so bæði Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin at góðtaka.

Leiðslurnar í hesum flokkum hava tó fleiri ferðir gjørt greitt, at valið vísti, at haldast má aftur við fullveldisgongdini og rekast má ein meira hóvligur sjálvstýrispolitikkur. Tær hava tí eisini mælt til at taka Javnaðarflokkin við í eina samgongu fyri nettupp at skapa betri javnvág fyri eini hóvligari gongd. Tað, ið kortini tykist henda, er, at kreftir í Tjóðveldisflokkinum, sum ikki av politiskum orsøkum men av øðrum orsøkum, fyri ein og hvønn prís vilja halda Javnaðarflokkin uttanfyri. Við blint at gøðtaka krøvini hjá Tjóðveldisflokkinum hava leiðslurnar í bæði Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum svikið teir mongu av sínum veljarum, ið greitt vendu sær ímóti tí politikki, sum eftirhondini bara Tjóðveldisflokkurin stendur fyri.

At Fólkaflokkurin hevur tikið hesa støðu er kanska betri skiljandi, tí varamenninir hjá sitandi landsstýrismonnum floksins vilja tað sama sum Tjóðveldisflokkurin í fullveldisstrembanini. Tó undrar tað okkum stórliga, at løgmaður uttan víðari góðtekur hetta. Men tað er ikki skiljandi, at Sjálvstýrisflokkurin letur seg lokka til at vera partur í hesi milt sagt skarnsgerð í politikki, har ávísir persónar í flokki loyva sær at útiloka ein annan flokk – ikki av politiskum men møguliga meira av persónligum orsøkum. Vit hava sæð í seinastu hvussu formaður Javnaðarfloksins hevur verið úti fyri einki minni enn eini hetz frá tjóðveldisfólki – við tí eina endamáli: at steðga flokkinum og seta hann uttan fyri alla ávirkan. Leiðslan í Sjálvstýrisflokkinum hevur fleiri ferðir gjørt púra greitt, at veljarar floksins hava givið henni greitt at vita, at flokkurin eigur ikki at halda fram saman við Tjóðveldisflokkinum sum um einki er hent. Tingmaður floksins hevur eisini ærliga og rætt víst á hesa sannroynd og sagt frá, at hann vil hava Javnaðarflokkin við í samgonguna.

Stóri spurningurin er tí nú: hví hálsar hann um? Sjálvstýrisflokkurin situr framvegis við lyklinum til ta samgongu, sum leiðslan í flokkinum alla tíðina hevur víst á. Kári Højgaard hevur bara seg sjálvan at spyrja og líta á. Hann hevur ongar Poul Mickelsennar at taka hensyn til. Hann kann – um hann vil tað og um hann vil lurta eftir sínum veljarum – bara siga við hinar, at skal kravið hjá Tjóðveldinum at fáa Jenis uppí verða gingið á møti, skal Javnaðarflokkurin eisini við, eitt nú fyri at halda javnvágina í sjálvstýrismálinum. Og tá Kári sjálvur hevur verið við til at gera samgonguskjálið og hetta ikki fer longur enn tað Javnaðarflokkurin kann ganga við til, tá átti hetta at verið eitt sjálvsagt og rættvíst krav.

Tá ein ACDE samgonga tí ikki ber til, so eigur ein ACDEH samgonga at bera til. Tjóðveldið, sum vil styrkja fullveldisvongin við at taka Jenis við, hevur fingið H við, og Sjálstýrið, sum vil leggja seg á eina meira hóvliga sjálvstýriskós, fær C við. Tað skuldi so aftur hóvað hvør sínum vongi í Fólkaflokkinum. Punktum finale.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# "Ógrundaðar atfinningar" – sigur landsstýrismaðurin

**Hergeir Nielsen**
*løgtingsmaður*



Løgtingsins vilji er klokkuklárur. Landsstýrismaðurin fekk teir pengar hann bað um, og meiri afturat, fyri at tryggja okkum siglingina um Suðuroyarfjørð.

Henda sigling liggur í dag í skeljasori.

Løgtingsins vilji verður ikki fylgdur, og hesum hevur landsstýrismaðurin einsamallur ábyrgdina av.

22. mai 2002 handaði eg tí løgmanni eitt skriv við eini áheitan um beinanvegin at taka neyðugar politiskar og umsitingarligar avgerðir, sum kundu loysa bráðkomnu trupulleikarnar við flutningi um Suðuroyarfjørð.

Løgmaður, sum hevur eftirlit við at landsstýrismenn røkja sítt arbeiði á fullgóðan hátt, svaraði ikki spurningum mínum, men lat landsstýrismanin sjálvan svara fyri seg.

Hesin heldur fyri, at atfinningarnar frá mær eru ógrundaðar, men leggur afturat, at løgtingið játtaði honum neyðuga peningin og meiri afturat, so at siglast kundi enn fleri túrar um Suðuroyarfjørð, enn hann ætlaði.

Eisini segði landsstýrismaðurin í SvF, at fíggjarliga heimildin til at kanna og leiga líkinda avloysaraskip var tryggjað stovninum í nóg góðari tíð, og at henda fatan var í samavari við niðurstøðuna hjá fíggjarmálastýrinum.

Landsstýrismaðurin hevur sostatt boðað frá, at hann er ósamdur við leiðsluna á strandferðsluni, sum segði, at har í húsinum varð eingin leigusáttmáli undirskrivaður, sum ikki hevði eina av løgtinginum samtykta heimild at halda seg til, og tað varð í fyrsta lagi 1. januar.

Tvinnar fatanir eru sostatt av fíggjarliga heimildarspurninginum, og er tað strandferðslan, sum sigur seg styðja seg til játtanarskipanina og stýrisskipanarlógina, sum stýrir vinnumálastýrinum og landsstýrismanninum.

Hetta er ein sera áhugaverd niðurstøða, tí tað er jú landsstýrismaðurin, sum heftir fyri ruðuleikanum mótvegis løgtinginum, og strandferðslan man so ikki halda landsstýrismannin halda seg til hvørki játtanar- ella stýrisskipan landsins.

Svarað verður eisini, at roynt verður at minka um trupulleikarnar, ið standast av, at Dúgvan er sett at røkja siglingina um fjørðin, og at strandfaraskip landsins framvegis kannar møguleikarnar fyri at loysa trupulleikarnar.

Hetta sigur okkum so eisini tað, at reint tekniskt hevur stovnurin hildið, at tær loysnir, ið ætlaðar vóru, vóru nóg tryggar og nóg væl umhugsaðar.

Her er ikki neyðugt at leita í nakrari hægri lóggávu fyri at finna fram til, at stovnurin hevur mistikið seg, so tað brakar í.

Var talan um eitt nýtt mál, so hugsi eg, at vit høvdu livað við tí. Men talan er um eitt afturvendandi mál, og tað er ikki til at liva við.

Fleiri ferðir havi eg undir undir viðgerðini av løgtingsfíggjarlógini ført fram, at serstøk fíggjarheimild ikki var neyðug til leigu av avloysaraskipi, vísandi til, at hetta var partur av virkseminum hjá stovninum, sum eisini fevndi um at tryggja okkum fluttning, tá ið størsti tørvurin var á tí.

Hesi niðurstøðu sigur landsstýrismaðurin seg samdan í, og at eisini fíggjarmálastýrið hevur somu fatan.

Hvussu SL fær gjørt aðrar bindandi avtalur áðrenn ársskifti, og áðrenn fíggjarlógin er samtykt, er mongum manni ein gáta, tá tað ikki ber til at ráða yvir 2 mió.kr., sum júst vóru markaðar til endamálið.

Stóra mistakið hjá landsstýrismanninum er, at hann hevur ikki álagt strandferðsluni, hvussu stýrisskipanarlógin og fíggjarligu heimildarspurningarnir hanga saman, og tí eru vit enn eina ferð endaði úti í fullkomnum ruðulleika í siglingini um Suðuroyarfjørð.

Hóast hesar sera pínligu veruleikar, so svarar landsstýrismaðurin løgmanni, at: »Samanumtikið heldur landsstýrismaðurin tí, at atfinningarnar hjá Hergeiri Nielsen eru ógrundaðar.«

Ógrundaðar atfinningar sigur landsstýrismaðurin, sum kortini sigur seg samdan í somu atfinningum.

Landsstýrismaðurin eigur ábyrgdina, og skilligt er, at hann vil ikki viðurkenna sær hana.

Løgmaður tekur onga støðu, men svarar at enda, at hann fylgir alla tíðina við støðuni. Hesum er lítil uggi í, tí hesum góða vilja einsamøllum livir eingin av.

Heitt verður tí enn eina ferð á løgmann – landsstýrismannin og strandferðsluna – um at skilja løgtingsins vilja á rættan hátt.

Farið til verka sum skjótast – burturi sum heima – og leitið upp loysnir, ið kunnu tryggja okkum eitt ella fleiri sømulig skjóttgangandi sambond um Suðuroyarfjørð beinanvegin.

# Fasinerandi grand-prix úrslit

**Sámal Matras Kristiansen**

Eg má siga, at tað kom eitt sindur dátt við at frætta, at Danmark endaði á aftasta plássi. Hasin sangurin hevði faktiskt uppiborið betri. Men hetta er sæð fyrr. Fyrra árið endaði suvereni sangurin hjá Sofia Mestari á sama dumpingarplássi, hóast hann var tann absolutt besti sangurin. Tað var bara ikki hugur fyri fronskum júst hetta árið.

Men eg kundi nú ikki lata vera við at smírast eitt sindur yvir úrslitið, tí handa góða Malena fekk akkurát sama umgang sum Pætur fekk í danska grand-prix'num. Pætur varð revsaður fyri at vera nakað so óúthaldiligt (í donskum eygum) sum ein føroyingur, og nú tykist sum um danir veruliga eru við at gerast ein symbolsk paria í evropeiskum høpi, eins og føroyar eru tað innanvert ríkisfelagsskapin.

Gud gævi danir taka við læru av hesum symbolska smeitinum og taka seg saman og leggja sjógv millum seg og hesar smárasistisku streymarnar, ið hava gjørt seg galdandi á flatlondum hetta seinasta árið.

Eg meini – tá ið sjálvt SF'arar og radikalar loyva sær at úttala seg rasistiskt, hvar eru vit so á veg???


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Anfinn & Co burdu sæð skriftina á vegginum

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



– og latið vera við at »klamra« seg til maktina og síðani givið øllum fair play við eini formansrundu.

Tað sum gongur fyri seg á politiska vígvøllinum í løtuni er ikki sørt ørkymlandi – bæði fyri politikkarar og ikki minst fyri veljarin, sum setti krossin tann 30. apríl.

Fólkaflokkurin við løgmanni á odda hevur sæð seg sjálvan sum tann einasta »rætta« flokkin at leiða Føroya Fólk burtur úr oyðimarkargongdini, sum teir halda, at ríkisfelagsskapurin er fyri Føroyar, og Føroya Fólk sum heild – hetta hóast at valið tann 30.apríl vísti annað, nevniliga at fólkið vildi hava vaktarskifti á føroysku skútuni.

Seinasta veljarakanningin hjá Gallup kunngjørd í Fregnum ídag 23.03.02, vísir eina uppaftur størri framgongd til Sambandsflokkin – hetta ivaleyst ikki uttan orsøk!!!??

Eg má geva Jóannesi Eidesgaard rætt, tá hann sigur, at tað er nógv fyri at dumpikandidatarnir hjá Fólkaflokkinum nú skulu verða tungan á vágskálini um, hvørvítt fólkavaldu løgtingslimir Javnaðarflokksins og Sambandsflokksins eru »verdir« at verða í samgongu við »harraflokkin« ella ikki.

Í mínum eygum og ivaleyst eygunum á nógvum veljarum við – er tað sum gongur fyri seg í løtuni – »ella rættari slettis ikki gongur fyri seg« – ein sera mannminkandi støða fyri bæði løgmann og Fólkaflokkin sum heild, hvat vil hann náa við hesum glantrileiki????

Anfinnur løgmaður – vís teg sum ein mann – legg frá tær og lat formansrunduna avgera, hvør kemur at mynda leiðsluna í Føroyum komandi 4 árini – tað vildi verið fair play – um nakað kann kallast so í politikki.

# Semi Intellektuelt hudibras

**Páll Poulsen**

Í Fregnum standa mangan greinar um mangt og hvat. Felags fyri teir høvundar sum hava lyndi til at fróðskapa sær í tjóðskaparligari tilvitan ella tjóðskapan er at teir ikki evna at lata hamin liggja.

Jóanes Nielsen rósti herfyri Kim Simonsen, hóast hesin enn ikki hevur kastað dúnið av sær, og lært at viðgera eitt evni, heldur enn at sitera ymiskt leysasøkk hann hevur hoyrt í onkrum auditorium á skandinaviskum universiteti.

Tá Kim Simonsen sleingir um seg við t.d. Ernest Gellner, eigur hann at diskutera evnið, og um hann vil, seta tað í eina føroyskt tilgongd. Eg veit væl at »nationalromantiska« periodan endaði í 1901, men tann »logiski« endin kom ongantíð. Ein logiskur endi er eitt tilhugsað tjóðarfrælsi, har ábyrgd og framtíðarætlanir liggja slag í slag. Her kunnu aðrir sum t.d. Andersson og Kedourie eisini takast við í eina diskussión.

Tíverri hava akademikarar og teir sum aspirera til at vera akademiskir tann herviliga óvana at draga tað uppá sínar herðar, sum onnur fyrr hava sagt. Fyri seinni at fáa tað til at teir sjálvir hava funnið uppá tað. Virgar Dalsgaard plagar at taka til at suðringar lurta eftir gomlum Dirch Passer plátum og gera skemtið um til at tað er nakað teir sjálvir hava funnið uppá.

Umframt Kim Simonsen er tað ein Bergur Hansen, sum fullkomuliga hevur misfatað okkara góða William Heinesen og hansara jørðildi í bókmentasøguligum høpi. Honum á baki gongur Hanus Andreassen, sáli og prædikar nakað hann hvørki skilir ella kann liva seg inn í. William Heinesen var ikki nationalur á nakran máta.

Afturat hesum persónum kemur so ein føroyskur Britpoppari, Meinhard Jensen, sum er so gýseliga keðiligur, at hann fær ilt í rassin av Kimminum.

At Kim Simonsen er í øðini, skilji eg væl. Hann er uppvaksin úti á eini bygd og tað er ein keðilig fortíð at bera í skjáttuni. Um bygdin ikki hevur verið nóg andliga burðardygd ella luttikið í eini broytingartíð.

Á Strondum gav mold kanska meiri meining enn nakað hugvísindi. Tí hevur Kim eina fobi, og tað kann bert hann sjálvur gera nakað við.

# Alment mótmæla undirsjóartunnlar?

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*



Eg havi fleiri ferðir áður mótmælt at farið var undir undirsjóartunnil undir Vestmannasund og eisini ein slíkan undir Leirvíksfjørð. Hetta skulu vit øll fáa steðga í løgtinginum. Eg haldi, at vit øll skulu steðga undirsjóartunnlinum undir Vestmannasundið og flyta alt grótið og annað tilfar frá Signabø til hendan og beinanvegin fáa fylt í aftur.

Eg vildi heldur fingið eina farðleið í millum Gomlu Rætt og Miðvág, ið skuldi fingið eina størri ferjulegu, tí so spardu vit allan flutningin um Vestmannasund.

Eg haldi eisini, at vit skulu umhugsa at taka farleiðina hjá Smyril millum Havnina og Klaksvíkina upp aftur, og við tí nýggja, tá hesin kemur til Føroyar. Eg haldi, at Leirvík kann gott vera allan hendan flutningin tvørtur um Leirvíksfjørð fyri uttan, og skulu vit heldur fáa áðurnevndu farleið.

Eg haldi, at vit skulu steðga øllum flutningi av fiski og ruski við Strandfaraskipum Landsins um Vestmannasund og Leirvíksfjørð eins og úr Suðuroy og Sandoy. Tað hevði verið frægari loysn, um landið hevði gjørt avtalur við Skipafelagið Føroyar og Smyril Line, tá ið talan er um at avskipa allan fisk til útflutnings. Tað hevði verðið uppá tíðina, at býráð og flutnings- og vinnufyritøkur fingu tosað saman um at fáa slíkar flutnings avtalur í lag sum skjótast, tí tá kunnu vit sleppa undan verkføllum í raka allar útjaðaroyggjar. Hetta gerst við at fáa aðrar flutningsmøguleikar í staðinfyri at nýta Strandfaraskip Landsins.

Tað skal skipast fyri, at allur flutningur av fiski gjøgnum Norðurstreymoy og gjøgnum tunnlar oman fyri Sundalagi og Signabø, verður steðgaður.

Tað skulu øll fólk gera sær nóg greitt, ið rakt eru av verkføllum, ein kemur aftur til í bløðum.

# Altjóða tubbaksfríur dagur

TÍÐINDASKRIV
*Fyribyrgingarráðið*

Altjóða heilsufelagsskapurin, World Health Organisation, WHO tók í síni tíð stig til alheims tubbaksfrían dag (World No Tobacco Day). WHO hevur ásett, at 31. mai á hvørjum ári skulu serlig tiltøk verða sett í verk, fyri á ein serligan hátt at gera vart við tær menniskjaligu og búskaparligu fylgjurnar av tubbaksnýtslu. Hetta er ein partur av eini verkætlan hjá WHO, kallað »Tobacco Free Initiative«. Hvørt ár hevur tubbaksfríi dagurin havt eitt tema, ella slogan. Í fjør var hetta »Second hand smoke kills« (passiv royking drepur).

Í ár er snýr tað seg um ítrótt: »Tobacco Free Sports – Play it Clean« (Tubbaksfríur Ítróttur – Latið okkum spæla reint).

Hetta fer at merkjast á komandi World Cup kappingini í fótbólti, sum verður í Japan og Suðurkorea. FIFA og WHO hava til hetta endamálið gjørt eitt memorandum sum sigur m.a. at royking verður bert loyvd í serligum hølum, sum eru uttanfyri høvðusøkið á stadion, har fólk halda til. Søla av tubbaksvørum inkl. automatir verður ikki loyvt á stadionøkinum, og royking verður ikki loyvd í barrum og á matstovum. Hetta memorandum, undirskrivað av Gro Harlem Brundtland og Joseph Blatter kann lesast á hesari heimasíðuadressuni: http://www5.who.int/tobacco/repository/stp71/moc.pdf

Fyribyrgingarráðið vil, saman við altjóða heilsufelagsskapinum WHO eggja fólki til at halda heimini og arbeiðsplássini roykfrí í ein dag. Gongur tað fyrst væl ein dag, hví so ikki fleiri dagar. Ætlaði tiltøk í ár eru:

Legg-av pakkar: Meira enn 350 vórðu keyptir seinasta ár – ein góð ábending um, hvussu álvarsliga nógv fólk hugsa um at leggja av.




Klipp ein seðil út, sum verður í bløðunum í vikuni frá 21. mai, og nýt hann til at keypa ein pakka fyri 25 kr. á apotekum kring landið.

Hetta er ein týdningarmikil sparing á kostnaðinum á nikotin tyggigummi, sum er viðlagt. Við í pakkanum eru eisini upplýsingar um, hvussu tað letur seg gera at leggja av at roykja við góðum úrsliti.

(Apoteksverkið og Klaksvíkar Býráð stuðla, saman við Fyribyrgingarráðnum hesum tiltaki).

Barna teknikapping: Fyribyrgingarráðið letur 3 vinningar á 500 kr. til vinnarar, sum tekna eitt upprunaligt ikki-roykja merki.

Luttakararnir verða býttir í tríggjar aldursbólkar - upp til 6 ár, 7-10 ár og 11-14 ár.

Eitt roykfrítt heim átak: Eitt ókeypis borðskelti verður latið við hvørjum keypi á apotekum vikuna frá 28. mai. Fólk kunnu nýta tey at gera heim teirra roykfrítt 31. mai. Roykfrí heim verja heilsuna hjá øllum, serliga okkara børnum. Hygg eftir sannroyndum um óvirkna royking á baksíðuni á skeltinum. (Klaksvíkar Býráð stuðlar hesum tiltaki saman við Fyribyrgingarráðnum)

Fyribyrgingarráðið fer at markera roykfría dagin 31. mai við einum tiltaki á torginum í SMS. Hetta verður gjørt í samarbeiði við Apoteksverkið, Føroya Felag móti Krabbameini og Hjartafelagið. Hesi fara at hava básar á torginum allan dagin.

Á básinum hjá Fyribyrgingarráðnum verða tekningarnar, sum børnini senda inn frammsýndar og vinnararnir fáa handað vinningarnar kl. 17.00. Vinningurin er 500 kr til ta bestu tekningina í hvørjum aldursbólki.

Umframt uppsløg , plakatir og aðra upplýsing fara fólk við básarnar at bjóða fólki ymiskt: høvi verður at máta CO (kol-súrevni) í útandingarluftini; hetta er eitt mát fyri hvussu illa ein er eitraður av hesum vandamikla evni, sum er í tubbaksroyki. CO trokar súrevni í blóðinum burtur soleiðis, at minni av súrevni er tøkt til evnisbroytingina í kyknunum í øllum kroppinum.

Hjá hjartafelagnum kann ein fáa mált blóðtrýst og BMI (body-mass-index) út frá hæddini og vektini. Við básin hjá Tjaldurs Apoteki kann ein keypa bíligt nikotin-tyggigummi o.a. í sokallaðum »legg av pakkum« og fáa upplýsing um hvussu hetta skal brúkast.

Fyribyrgingarráðið hevur fyrireikað eina røð av greinum í sambandi við tiltøk, sum verða Altjóða Tubbaksfría Dagin – 31. mai. Tey verða at síggja tær næstu tvær vikurnar og fevna um eitt úrval av tubbaks umrøðuevnum.